Anfinn Kallsberg, løgmaður:

# Fullkomiliga burturvið

**–Tað er fullkomiliga burturvið, tá ið Karsten Hansen og Høgni Hoydal siga, at eg nýti løgmansembætið til at reka partapolitikk. Eg úttali meg sum samgonguleiðari, tí tað, ið teir siga, ikki er í tráð við poltikkin hjá samgonguni, sigur Anfinn Kallsberg**



*Eingin dekningur er fyri útsagnunum hjá Karsten Hansen og Høgna Hoydal politiskt, heldur Anfinn Kallsberg, løgmaður.*

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Tað var løgmaður sjálvur, sum byrjaði tíðindabrævatrætuni í landsstýrinum, við at senda út eitt tíðindaskriv fríggjadagin, har hann hartaði teir báðar, Høgna Hoydal og Karsten Hansen.

Tíðindaskrivið er grundað á útsagnir frá áður nevndu landsstýrimonnum í íslendskum og føroyskum fjølmiðlum.

Tað er einamest útsagnirnar frá teimum báðum viðvíkjandi fýra ára skiftistíðini, ið hava vakt ans hjá løgmanni.

Hann sigur í tíðindaskrivinum, at úttalilsini eru í andsøgn við politikk samgongunnar mótvegis Nyrup-stjórnini, samgongusemjuna, løgtingssamtyktina um sjálvstýri og sjálvsavgerðarrætt Føroya fólks og ta felagsfráboðan, løgmaður og forsætismálaráðharrin undirritaðu í síðstu viku, og sum allir flokkar á tingi hava tikið undir við.

Hann undirstrikar harafturat, at samgongan heldur seg til løgtingssamtyktina, sum byggir á 12-15 ára búskaparliga tillaging ella ta tíð, sum tað eru búskaparliga forsvarligt at laga búskapin til føroyskt sjálvsstýri.

## Burturvið

Síðani Løgmaður sendi út sítt tíðindaskriv fríggjadagin, hava sum áður nevnt Karsten Hansen og Høgni Hoydal svarað aftur. Í teirra felagstíðindaskrivið verður m.a. sagt, at løgmaður nýtir sítt embætið til at reka partapolitikk.

Hetta heldur Løgmaður vera púrasta burturvið.

– Eg úttali meg sum samgonguleiðari og ikki sum fólkafloksmaður. Tað vera óivað eisini onnur sum fara at úttala seg vegna Fólkaflokkin, men tað er ikki eg í hesum førinum, sigur Anfinn Kallsberg.

Hann sigur, at tað ikki er nakar politiskur dekningur fyri tí, ið teir báðir, Karsten og Høgni, siga við fjølmiðlar.

Hann tekur tó stríðið so mikið róliga, at hann nevnir, at ósemjur eru vanligar í politikki, og hetta er heldur ikki so undarligt, heldur hann.

Hann er tó alt annað enn fegin um útspælini frá Karsten og Høgna, í fjølmiðlunum og í teirra felagstíðindaskrivi.

– Hetta skapar ótryggleika í samgonguni. Tí tað kemur ongantíð upp á tal, at vit fara at fáa eina fýra ára skiftistíð - í øllum førum ikki við mær sum samgonguleiðara, sigur Anfinn Kallsberg.

Hann kendi tað vera neyðugt at úttala seg um hetta alment í fjølmiðlunum, heldur enn at tosa við teir báðir innanhýsir. Hetta er heldur ikki at samgongumál, sigur Anfinn Kallsberg.

Hann heldur, at samstarvið hevur riggað væl í samgonguni, men hann heldur, at hann útspælið frá Karsten og Høgna má vera at rokna sum valupplegg.

Tá hann verður spurdur um hetta er eitt høvdingastríð í samgonguni, sigur hann, at tað í øllum førum er onkur, sum roynir at sleppa upp á brúnna, sum ikki longu er har.

Anfinn Kallsberg veit ikki at siga, hvussu verður víðari við hesum málinum.

---

Karsten Hansen:

# –Eg sigi mína hugsan

**– Eg havi svarað íslendskum tíðindafólki upp á konkretar spurningar, og tað má eg hava loyvi til. Tað harmar meg, at løgmaður fer í fjølmiðlarnar við hesum, sigur Karsten Hansen, nú løgmaður hevur sent tíðindaskriv út viðvíkjandi úttalilsum hjá Karsten Hansen og Høgna Hoydal**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Beint eftir middag fríggjadagin kom eitt tíðindaskriv frá Løgmanni, Anfinn Kallsberg, har hann hartar Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra, og Høgni Hoydal, varaløgmann, fyri at hava úttala seg um, at Føroyar fáa fullveldi um fýra ár. Hetta hava teir gjørt við ávíkavíst íslendskar og føroyskar fjølmiðlar.

Karsten Hansen sigur seg harmast yvir, at løgmaður kennir tað vera neyðugt at fara í fjølmiðlar við tílíkum. Hann vísir á, at hann hevur havt fleiri fundir við Anfinn Kallsberg, men á hesum fundunum er einki komið fram um hetta.

Løgmaður hevur sent úr tíðindaskrivi í sambandi við, at tíðindi bórust í sambandi við íslandsvitjanina hjá Karsten Hansen fyri kortum, at Karsten segði við íslendskar fjølmiðlar, at verður talan um oljuframleiðslu í/undir Føroyum, merkir hetta, at fullveldi verður veruleiki innan fýra ár.

Karsten Hansen sigur seg, at hann varð spurdur ein konkretan spurning frá íslendskum fjølmiðlafólki, sum kendu til prátið um fýra ára skiftistíð.

– Eg havi svarað íslendskum tíðindafólki upp á konkretar spurningar, og tað má eg hava loyvi til. Eg segði teimum mína hugsan um málið, og tað kann ikki koma óvart á nakran, at eg sum tjóðveldismaður hava hesa hugsan, og at hendan er ein onnur enn tann hjá Fólkaflokkinum, sigur Karsten Hansen.

Hann undirstrikar, at hansara úttalilsir byggja á avtalir, ið eru gjørdar millum Føroyar og Danmark, og hann kann ikki ímynda sær – um ein oljuvinna verður til veruleika – at danir framvegis verða sinnaðir at gjalda blokkstuðul.

Fíggjarmálaráðharrin harmast um, at Anfinn Kallsberg kennir tað vera neyðugt at fara í fjølmiðlarnar við hesum, tá ið Karsten sjálvur metir seg hava sagt sína egnu hugsan, einki annað.



*Karsten Hansen sigur seg hava sagt íslendskum tíðindafólki sína egnu hugsan og einki annað*

– Eg greiddi teimum eisini frá samtyktiktini, ið samgongan hevur gjørt, sigur Karsten Hansen.

## Svara aftur

Spurdur um, hví teir eisini hava valt at fara í fjølmiðlar við einum tíðindaskrivi og ikki bert loysa trupulleikan innanhýsis í samgonguni, sigur Karsten Hansen, at teir hava ikki gjørt annað enn at svara tíðindaskrivinum frá Løgmanni aftur, og tað má mann væl rokna við.

At hetta er nakað valupplegg frá teirra síðu, vil Karsten Hansen ikki hoyra talan um, men roknar samstundis við, at Løgmaður sum fólkafloksmaður roynist at tekkjast sínum egnu veljarum, sum í ein stóran part eru sambandsfólk.

Sum heild skilir Karsten Hansen ikki rættiliga, hví Løgmaður kennir tað vera neyðugt at senda út tíðindaskriv.

– Eg skilji ikki trupulleikan. Stevið í samgonguni – í øllum førum í landsstýrinum – hevur verið gott, og samstarvið hevur verið sera gott. Eisini tí kennist tað ørkymlandi, at Løgmaður nú kemur við hesum, sigur Karsten Hansen.

Í tíðindaskrivinum frá Karsten og Høgna verður millum annað sagt, at Løgmaður nýtir løgmansembætið til at reka partapolitikk og við skeivum upplýsingum.

Tá ið vit spyrja Karsten Hansen um hetta, vil hann ikki siga nakað um, at hetta nú merkir, at hann metir, Løgmaður misnýtir sítt embæti.

Karsten Hansen veit ikki siga, hvørjar fylgjur hetta fær fyri samgonguna ella samstarvið millum hann og Anfinn Kallsberg.

Tíðindaskrivið er soljóðandi:

<u>Tíðindaskriv</u>

**Løgmaður rekur partapolitikk við villeiðandi upplýsingum um fullveldismálið**

Tað undrar okkum stórliga at frætta umvegis fjølmiðlarnar, at løgmaður í einum tíðindaskrivi viðger úttalilsir hjá undirritaðu á ein villeiðandi hátt. Vit hava báðir verið saman við løgmanni, har hann onki hevur nevnt um hetta við okkum.

Vit harmast tó mest um, at ein røð av villeiðandi upplýsingum eru í tíðindaskrivinum frá løgmanni:

1. Karsten Hansen hevur sagt uppá fyrispurning frá íslendskum fjølmiðlum, at um olja verður framleidd og um búskaparvøksturin heldur fram, so trýr hann uppá, at føroyingar taka fullveldi innan næsta valskeið er runnið.
2. Høgni Hoydal segði í fimmaranum í ÚF, at vit halda okkum til løgtingssamtyktina um sjálvstýri Føroya fólks. Hana hava vit sjálvi orðað og lagt fyri tingið. Har eru ásettar tíðarfreistir, tá málsøki í seinasta lagi skulu verða komin á føroyskar hendur. Og sambært henni, skal alt verða framt í seinasta lagi um 10 ár.
3. Í sama fimmara segði Høgni Hoydal, uppá fyrispurning um støðu Tjóðveldisfloksins, at um vit framdu tær neyðugu yvirtøkurnar og hildu fram við tí sjálvberandi búskaparpolitikkinum, so miðaði Tjóðveldisflokkurin eftir at hava eina fólkaatkvøðu í næsta valskeiði.
4. Tað er tí beinleiðis skeivt, tá løgmaður sigur, at okkara úttalilsir eru í andsøgn við løgtingssamtyktina og samgongusemjurnar.

Tað er hinvegin beinleiðis í andsøgn við løgtingssamtyktina, tá løgmaður tosar um tíðarfreistir uppá 12-15 ár. Vit skilja ikki, hvussu løgmaður roknar seg fram til hetta tal.

Vit hava hildið allar avtalur í hesi samgongu til punkt og prikkar og tað gera vit framvegis. Vit hava enntá góðtikið, at avtalur verða brotnar og hava funnið semingsloysnir til tess at røkka á mál.

Tað er í lagi, at Anfinn Kallsberg sum fólkafloksmaður sigur sína politisku hugsan. Men tað er ikki rætt at brúka løgmansembætið til at reka partapolitikk við skeivum upplýsingum. Tí átti eitt tílíkt tíðindaskriv at verið sent frá fólkaflokkinum og ikki frá løgmanni. Tá hevði eisini verið høvi at spurt, um fólkaflokkurin hevur slept fullveldisætlanini, og hvørjum tað skal gagna støðugt at leggja eftir sínum egnu samgongufeløgum?

Er tað tildømis ein samdur fólkaflokkur, ið tekur undir við skrivingini í Dagblaðnum, har boðskapurin er, at bert Tjóðveldisflokkurin vil ikki viðurkenna, at føroyingar vilja verða verandi í danska ríkinum?

Tórshavn, 20. januar 2002.

Høgni Hoydal og
Karsten Hansen




